# ÁRSFRÁGREIÐING

April 2022







HANDILSVINNUFELAGIÐ

# Innihaldsyvirlit


Yvirlit yvir limirnar ........ 4
Frágreiðing frá nevndini ........ 5
Endamáls felagsins ........ 8
  Nevndin í Handilsvinnufelagnum ........ 9
    Í nevndini sita ........ 9
    Limatal í Handilsvinnufelagnum ........ 10
    Limagjald í Handilsvinnufelagnum ........ 10
Árið ið fór ........ 11
  Framløga um negativa rentu og íløgurøkt ........ 11
  GDPR tiltak fyri handilsvinnuna ........ 12
  Z-ættarliðið hevur ikki somu loyalitetskenslu ........ 13
  Eru sosialir miðlar góðir fyri fólk og fyritøkur ........ 14
  Søgan um føroysku handlarnar ........ 15
  #tosa pent við meg ........ 16
  Handilsvinnan hittir miðnámsskúlanæmingar ........ 17
  Merkantilu útbúgvingarnar ........ 19
  Vit sum handla ........ 20
  Smápakkar úr Kina ........ 20
  Nýggj pantskipan á einnýtisíløt ........ 20
Støðan nú og frameftir ........ 21
Viðtøkur ........ 22
  Viðtøkur handilsvinnufelagsins ........ 22

# Yvirlit yvir limirnar

3-Arin
Alvaró Sp/f
Asile Sp/f
Bakkhús P/F
Balslevs Timburhandil & Byggibúð P/F
Berglon
Bókabúðin
BORG P/F
Colorama v/ Peter Gaardlykke Sp/f
EAST Sp/f
ECOPACK Føroyar
Effo P/f
Eikin P/F
EL-IN
Eldhús P/F
Elding Sp/f
Føroya Bjór
Føroya Møblasøla
FTZ - Billutir og Amboð P/f
H. N. J. Bókhandil
Haraldsen P/F
Hjá Fróða
HTH Føroyar
Insito
Inventar Tænastan Sp/f
Jensen, P/F Carl A.
Jógvan Weihe P/F
Just Drive Sp/f
Kaj  Andreasen & Co
KBI Sp/f
Kemilux
Landshandilin
Leif Mohr P/F
Litaval P/F
Magn P/F
MBM Búrøkt
Nema P/F
Niels L. Arge
Optikbúðin Sp/f
Orkis Sp/f
P. E. Kolonial
Pidda, P/F hjá
Poul Hansen P/f
Poul Michelsen P/f
Poulsen, Sp/f John
Radiobúðin Sp/f
Rit og Rák Sp/f
ROSAH
Shari
Shop-In Sp/f
Skálin sp/f
Skálkur Holding P/F
Skóhornið
Skós - A/L Sp/f
SMS P/f
Solar Føroyar
Svend Krosstein P/F
Thomas Dam á Hálsi P/F
Thomas Dam P/F - Ítróttur
Várperla
Vest Pack P/F
Zach. Müller Fa.

# Frágreiðing frá nevndini

Hesi seinastu tvey árini hava verið tvey óvanlig ár fyri føroysku handilsvinnuna.

Tá vit fóru um árskiftið 2019 væntaðu tey flestu, at framgongdin og vøksturin, sum hevði verið árini frammanundan, fór at halda fram í 2020, men so var ikki.

Vit vóru bert komin stutt inn í 2020, tá ið allar forsøgnir brádliga vórðu vendar á høvdið, tí ein koronafarsótt, sum hevði tikið seg upp í Kina, fór brádliga at spjaða seg skjótt um allan heimin. Fyri at tálma smittuspjaðingini, vórðu umfatandi tiltøk sett í verk, sum læstu stóran part av virkseminum kring allan heimin niður.

Í Føroyum var tað á grækarismessu 2020, at koronatiltøkini læstu stórar partar av samfelagnum niður. Tað vóru serliga ferða- og matstovuvinnurnar, sum alt fyri eitt merktu sviðan av tiltøkunum, tí har varð næstan alt virksemi steðgað yvir nátt.

Tiltøkini skelkaðu eisini handilsvinnuna, men føroyska handilsvinnan kom seg rættiliga skjótt aftur, tí føroyingar sluppu ikki av landinum at ferðast og brúktu sostatt ein part av pengunum, tey høvdu sett av at ferðast fyri, í heimligu handilsvinnuni.

Vøksturin í umsetninginum í føroysku handilsvinnuni í 2020 og 2021 er tí fyri stóran part grundaður á óvanligar umstøður. Hesar umstøðurnar og fortreytirnar fyri vøkstri, javna seg aftur, so hvørt koronaavmarkingarnar verða strikaðar og londini lata upp aftur fyri ferðafólki.

Hesa tillagingina til vanligar umstøður byrjaðu vit longu at síggja aftur í søluni í síðsta ársfjórðingi í 2021.

Jólasølan var tí nakað lakari í 2021 enn í 2020, men tað komst eisini av fleiri avlýsingum av jólaborðhaldum og øðrum tiltøkum, sum vanliga eru í desember, tí ein nýggj smittubylgja hevði tikið seg upp aftur í november 2021.

Í seinnu helvt av 2021 byrjaðu vit eisini av álvara at merkja aðrar avleiðingarnar og seinárin av nógvu koronastongslunum úti í heimi, við skjótt vaksandi rávøruprísum, vørumangli og stórum avbjóðingum á flutningsøkinum, serliga millum Evropa og Asia. Hesar avbjóðingar koma vit framhaldandi at stríðast við komandi tíðina.

Hóast koronaavmarkingarnar eru linkaðar og strikaðar í fleiri londum, so er óvissan í altjóða handli ikki minni nú enn hon hevur verið, eftir at koronafarsóttin spjaddi seg um allan heimin fyri gott tveimum árum síðan.

Nú eru tað avleiðingarnar av russisku innrásini í Ukraina, sum skapa stóra óvissu um altjóða handilin frameftir, har skjótt vaksandi inflasjónin er ein tann størsta avbjóðingin í altjóða búskapinum í

løtuni. Hetta merkist eisini hjá okkum, og vit fara heilt vist at síggja fleiri príshækkingar á vanligum gerandisvørum og nýtsluvørum annars, í nærmastu framtíð.
Hóast koronaavmarkingar, so hevur tað kortini eydnast at hildið nøkur tiltøk fyri limirnar í Handilsvinnufelagnum hetta seinasta árið.

Í apríl 2021 hevði Sverri Justinussen, leiðari fyri Betri Markets, framløgu fyri limir í Handilsvinnufelgnum um rentugongdna og møguleikarnar fyri alternativari íløgurøkt, nú rentan hevur verið negativ í fleiri ár.

Í mai 2021 varð skipað fyri heimleiðistiltakið, har Jens Christian Olsen, stjóri í Eirin, greiddi frá, hvørjar einfaldar mannagongdir kunnu vera settar í verk fyri at halda ásetingarnar í GDPR-lóggávuni.

Í november 2021 helt Rógvi Olavson, samfelagsfrøðingur, fyrilestur fyri limir í Handilsvinnufelagnum í kaffihúsinum í Havn, har hann m.a. kom inn á, hvussu loyalitetsviðurskiftini millum kunda og handil broytast gjøgnum ættarlið.

Í mars í ár hevði Bjarni Arge, miðlafrøðingur, framløgu í Handilsvinnufelagnum um sosialar miðlar.

Limirnir í Handilsvinnufelagnum fingu aftur í ár høvi at vitja á Glasi og á Miðnámsskúlanum á Kambsdali. Endamálið við vitjanunum var at kunna næmingarnar um møguleikan at byrja yrkisleiðina eftir miðnámsskúlan við einum læruplássi í einari føroyskari fyritøku. Fyritøkurnar høvdu við hesum vitjanum møguleika at heilsa upp á tey ungu, lurta eftir teirra ynskjum og greiða frá, hvat eitt arbeiði í teirra fyritøku fevnir um, og hvørjar møguleikar tey hava, um tey velja eitt lærupláss í akkurát teirra fyritøku.

Handilsvinufelagið hevur eisini arbeitt við øðrum síðan aðalfundin í fjør.

Í juli 2021 skrivaði Handilsvinnufelagið undir sáttmála við Helga Jacobsen, journalist og rithøvund, um at skriva søguna um føroysku handlarnar. Miðað verður eftir at geva bókina út í heyst.

Fyri at verja øll tey ungu, sum sita við kassatólini kring landið, móti óhøviskum ágangi frá kundnunum, hevur Bruna & Arbeiðseftirlitið, saman við Handilsvinnufelagnum, latið gjørt eitt stutt filmsbrot, ið skal minna okkum á at tosa pent við tey ungu, sum sita við kassarnar í handlunum kring landið. Filmsbrotið verður víst í “Gevið Gætur” innslagnum í Kringvarpi Føroya, beint undan “Degi & Viku”.

Viðvíkjandi merkantilu útbúgvingunum er framvegis einki hent síðan Yrkisútbúgvingarráðið lat politisku skipanin síni tilmæli, uttan at arbeiðsbólkurin hevur havt tilmælið aftur til viðgerar eftir broytingar í m.a. Danmark.

Handilsvinnufelagið hevur tí nýliga sent eina áheitan til yrkisútbúgvingarstjóran á Glasi, um at skipa skúlagongdina meira samanhangandi, helst 3 ferðir 2 vikur og í øðrum lagi 1 viku í senn, umframt at skipa undirvísingina meira í verkætlanum og í minni mun sum vanliga skúlagongd. Hetta hevði verið ein stórur fyrimunur, tí tá høvdu tey, sum hava lærlingar vita, hvat undirvíst verður í

hvørt einstakt skeið, og tað gevur møguleikar fyri at taka evnið upp saman við lærlinginum á arbeiðsplássinum.
Handilsvinnufelagið hevur havt umboð í einum arbeiðsbólki undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, sum skuldi lýsa ymsar spurningar fyri landsstýrismannin viðvíkjandi einari nýggjari pantskipan á einnýtisíløt. Arbeiðsbólkurin hevur latið sítt arbeiði úr hondum, og málið liggur nú hjá landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum at arbeiða víðari við.

Handilsvinnufelagið hevur brúkt nógva orku til at vísa politisku skipanini á kappingaravlagandi skipanin fyri føroyska handilsvinnu, tá ið tað snýr seg um MVG-frítøkuna á av smápakkum frá útlendskum nethandlum, men Handilsvinnufelagið má tíverri staðfesta, at føroyskir politikarar als ongan áhuga hava fyri at gera nakað við hetta málið.

Handilsvinnufelagið hevur eisini havt nakað av lýsingum á Facebook og Instgram fyri at vekja áhugan hjá teimum unga fyri handilsvinnuni sum yrkisleið.

Handilsvinnufelagið fylgir væl við lógum og reglum sum kunnu ávirka virksemið í føroysku handilsvinnuni. Handilsvinnufelagið fer at halda somu kós sum frameftir, har føroyska handilsvinnan alsamt verður gjørd meira sjónlig í almenna rúminum, umframt at skipa fyri tiltøkum av ymsum slag fyri limir felagsins. Handilsvinnufelagið fer framhaldandi at leggja stóran dent á at veita best møguliga tænastu og ráðgeving til limir sínar.

**Tórshavn, tann 21. apríl 2022**

**Eyðvør Berg**
forkvinna

# Endamál felagsins

Handilsvinnufelagið er vinnugreinafelag, ið umboðar seráhugamálini hjá føroysku handilsvinnuni.

Limirnir í handilsvinnufelagnum eru framleiðslufyritøkur, heilsølur og vanligir handlar, ið selja alt frá knappanálum, góðgæti, matvørum, klæðum, teldum, maskinum, byggitilfari til tænastu-veitingar av ymsum slag.

Handilsvinnufelagið er sostatt meginfelag fyri allar føroyskar handilsfyritøkur, sum selja eitt ella annað, líka mikið um tað eru vørur ella tænastur.

Tað eru serliga fyritøkur, ið virka á føroyska heimamarknaðinum, ið eru limir í Handilsvinnufelagnum.

Handilsvinnufelagið strembar eftir at veita limum sínum best møguliga tænastu.

Málið hjá Handilsvinnufelagnum er at menna og styrkja føroyska handilsvinnu sambært raðfestingunum, sum limirnir í Handilsvinnufelagnum seta á skránna, og tað eru tí limirnir í Handilsvinnufelagnum, ið gera av, hvussu felagið skal ávirka gongdina og menningina av føroyskari handilsvinnu.

Menningin av handilsvinnuni snýr seg m.a. um at vísa á týdningin av handilsvinnuni, soleiðis at fleiri fáa áhuga í at velja handilsvinnuna sum sína yrkisleið.

Hetta verður gjørt umvegis kunningar- og skeiðsvirksemi, men Handilsvinnufelagið er eisini virkin partur í tilgongdini at menna og ávirka úbúgvingarskipanina fyri føroyska handilsvinnu.

Ein onnur týdningarmikil uppgáva hjá Handilsvinnufelagnum er at umboða limir sínar mótvegis politisku skipanini og almennu myndugleikunum, soleiðis at føroysk handilsvinna fær best møguligar karmar at virka innanfyri.

Hetta ger Handilsvinnufelagið m.a. við viðmerkingum um støðu sína, tá ið lógir og reglur, sum kunnu ávirka limirnar í Handilsvinnufelagnum, verða fyrireikaðar.

Handilsvinnufelagið heldur eisini eitt vakið eyga við galdandi lógum og reglum fyri limir sínar.
Endamálið við hesum er at vísa politisku skipanini á, hvørjar lógir og reglur treingja til at verða dagførdar og broyttar, soleiðis at føroysk handilsvinna hevur kappingarførar og smidligar karmar at virka innanfyri.

# Nevndin í Handilsvinnufelagnum



*Frá vinstru: Bergur D. Jensen, Claus V. Christensen, Eyðvør Berg, Gunnar Mohr og Áki V. Poulsen*

## Í nevndini sita

- Eyðvør Berg, *forkvinna*
- Claus V. Christensen, *næstformaður*
- Gunnar Mohr, nevndarlimur
- Áki V. Poulsen, nevndarlimur
- Bergur D. Jensen, nevndarlimur
- Bjarni Bogason, tiltakslimur

## Limatal í Handilsvinnufelagnum

Í løtuni eru 62 limir í Handilsvinnufelagnum.

Gongdin í limatalinum í Handilsvinnufelagnum frá 2012 til 2022 sæst á myndini niðanfyri.

**Mynd 1: Gongdin í limatalinum í Handilsvinnufelagnum frá 2012 til 2022.**




*Kelda: Handilsvinnufelagið.*

## Limagjald í Handilsvinnufelagnum

Limagjaldið í Handilsvinnufelagnum er ásett eftir, hvussu nógv ársverk eru í viðkomandi handilsfyritøku, sí talvuna niðanfyri.

**Mynd 2: Yvirlit av áseting av limagjaldið í Handilsvinnufelagnum**

| Ársverk | Árligt limagjald | Mánaðarligt limagjald |
|---|---|---|
| 1-3 | 1.200 kr. | 100 kr. |
| 4-10 | 2.400 kr. | 200 kr. |
| 11-20 | 3.600 kr. | 300 kr. |
| 21-50 | 4.800 kr. | 400 kr. |
| 51- | 6.000 kr. | 500 kr. |

*Kelda: Handilsvinnufelagið.*

# Árið ið fór

Niðanfyri er stutt frágreiðing um ymiskt, sum hevur verið á skránni hjá Handilsvinnufelagnum seinasta árið.

## Framløga um negativa rentu og íløgurøkt

Í apríl 2021 hevði Sverri Justinussen, leiðari fyri Betri Markets, framløgu fyri limir í Handilsvinnufelgnum um rentugongdna og møguleikarnar fyri alternativari íløgurøkt, nú rentan hevur verið negativ í fleiri ár.



*Sverri Justinussen, leiðari fyri Betri Markets, hevur framløgu um íløgurøkt fyri limir í Handilsvinnufelagnum.*

Sverri greiddi millum annað frá negativu rentuni sum fyribrygdi og hví innlánsrentan er vorðin negativ.

Sverri vísti eisini á gongdina í amerikanska S&P 500-indeksinum seinastu 40 árini. Hetta tíðarskeiðið hevur indeksið verið positivt í 31 ár og negativt í 9 ár, svarandi til eitt árligt miðal avkast á 8,91% hesi 40 árini. S&P 500 indeksið er eitt indeks fyri 500 tær størstu amerikansku fyritøkurnar á partabrævamarknaðinum, og gevur tí eina góða mynd av gongdini við partabrøvum.

## GDPR tiltak fyri handilsvinnuna

Er GDPR ikki bert nakað fyri stórar handlar við stórari skrivstovuumsiting og dýrum KT-skipanum?

Eg havi bert ein lítlan handil, har vit eru nøkur fá fólk, sum loysa allar uppgávurnar í gerandisdegnum. Vit hava fult av gulum lepum við áminningum, nøvnum og telefonnumrum við kassan og á diskinum. Vit hava pakkar við navni og bústaði, sum skulu koyrast út til kundar, liggjandi frammi, og so hava vit eisini eina bók, har vit skriva navn og telefonnummur á kundum, sum læna vørur við heim.

- Hevur GDPR-lóggávan so nakað at siga fyri mín handil?
- Ja tað hevur hon, tí her hevur tú kanska longu brotið GDPR-lógina tríggjar ferðir.
- Hvussu tá? Og hvat skal eg gera, soleiðis at eg sleppi undan stórari bót fyri at bróta GDPR-lógina?

Fyri at fáa meira at vita um hesi viðurskifti, skipaði Handilsvinnufelgið fyri heimleiðistiltakið í mai 2021, har Jens Christian Olsen, stjóri í Eirin, greiddi frá, hvørjar einfaldar mannagongdir tín handil kann seta í verk fyri at halda ásetingarnar í GDPR-lóggávuni.

Handilsvinnufelagið hevur í hesum sambandi latið gjørt ein faldarar við einføldum tilmælum og mannagongdum, hvat vanligir handlar eiga at gera fyri at halda GDPR-lóggávuna.

Limir í Handilsvinnufelagnum fáa faldaran við at venda sær til Vinnuhúsið.



*Jens Christian Olsen, stjóri í Eirin, við faldaranum um tilmælir og mannagongdir fyri at halda GDPR-lóggávuna.*

## Z-ættarliðið hevur ikki somu loyalitetskenslu

Í november 2021 helt Rógvi Olavson, samfelagsfrøðingur, áhugaverda framløgu fyri limir í Handilsvinnufelagnum í kaffihúsinum í Havn.

Í framløgu sínari kom Rógvi millum annað inn á, hvussu loyalitetsviðurskiftini millum kunda og handil broytast gjøgnum ættarlið.




*Rógvi Olavson, samfelagsfrøðingur, heldur fyrilestur fyri limir í Handilsvinnufelagnum í Kaffihúsinum.*

Tað sokallað Z-ættarliðið, sum eru tey, ið eru fødd í tíðarskeiðinum frá 1995 til 2010, eru javngomul við kommerciella internetið. Hetta ættarliðið kennir ikki til ein heim uttan internet.

Hjá Z-ættarliðinum verður ikki skilt ímillum at vera on og at vera off. Tey eru altíð on.

Internetið, og atgongdin til allan heimin umvegis snild telefonina, er ein natúrligur partur av teirra gerandisdegi. Hetta myndar bæði atferð og nýtslumynstur hjá Z-ættarliðinum, sum ikki sær út til at hava somu loyalitetskensnlu mótvegis ávísum merkjum og handlum, sum undanfarin ættarlið.

Hesin veruleiki er ein avbjóðing, sum kann koma at hava stóran týdning fyri handilsvinnuna, tá hon skal røkka framtíðarbrúkaran.

## Eru sosialir miðlar góðir fyri fólk og fyritøkur

Hetta var heitið á framløgu, sum Bjarni Arge, miðlafrøðingur, helt fyri limunum í Handilsvinnufelagnum í mars 2022 í Vinnuhúsinum.

Bjarni Arge er eisini kendur sum annar av vertunum í Amatøroyar.

Sosialir miðlar lumpa okkum hvønn dag. Vit lesa uppsløg, sum eru sniðgivin til okkum. Tað, vit halda, verður styrkt, og tað, vit ikki halda, verður fjalt.

Spyrt tú serfrøðingar, so eru nógvar góðar orsøkir hjá fyritøkum at brúka sosialar miðlar.

Tað selur vørur. Og tað passar eisini. Men eru fyritøkur ikki eisini við til at skapa fortreytirnar fyri, at vit liva í hvør sínum veruleika í dag gjøgnum sosialar miðlar?

Kundu lýsingapengarnir, sum fara til Facebook, gjørt størri samfelagsligt gagn aðrastaðni? Er tað skilabetri í longdini at lýsa á Facebook enn at banka upp á dyrnar hjá fólki?

Hetta vóru nakrir av spurningunum, sum Bjarni Arge, miðlafrøðingur, hugleiddi um á heimleiðistiltakinum í Vinnuhúsinum.



*Heimleiðistiltak í Vinnuhúsinum við Bjarna Arge, miðlafrøðingi.*

## Søgan um føroysku handlarnar

Handilsvinnufelagið hevur gjørt sáttmála við Helga Jacobsen, journalist og rithøvund, um at skriva søguna um føroysku handlarnar.

Nógv er skrivað um einahandilin, avtøkuna av einahandlinum og onnur handilsviðurskifti frá teirri tíðini. Tað er harafturímóti lítið skrivað um, tá handlar í hundraðatali vórðu staðsettir í teimum føroysku bygdunum og høvuðsstaðnum. Men við sáttmálanum millum Handilsvinnufelagið og Helga Jacobsen verður skjøtul settur á hetta arbeiðið.



*Claus V. Christensen, næstformaður í Handilsvinnufelagnum og Helgi Jacobsen, journalistur og rithøvundur, skrivað undir sáttmála um bók um føroysku handlarnar.*

Umframt at fylgja søguni hjá handlunum bæði í bygd og í bý, skal bókin geva eina heildarmynd av mynstrinum hjá handlunum og handilsvinnuni frá fyrstu handlunum til dagin í dag. Vit høvdu fyrst nakrar fáar, stórar handlar, síðani fingu vit nógvar smáar og kanska miðalstórar handilsmenn og hava nú aftur nakrar stórar handlar - í summum førum við sama mynstri, sum tað byrjaði við, nevniliga úthandlum.

Aðrar broytingar sleppa eisini upp í part. Eitt skifti høvdu vit til dømis fleiri útlendskar ferðandi sølumenn. Summir vóru 'dropsmenn'. Tann gamli handilin hevði skivu, og inn um hana sluppu bara tey útvaldu. So komu sjálvtøkuhandlarnir, sum í fyrstani ivaleyst vóru avbjóðandi fyri nógvar keypmenn. Handlarnir vóru eisini leingi tað sosiala savningarstaðið, har býar- og bygdafólkið kom saman at práta. Og 'handilsmenn' vóru ikki bara menn, men eisini konufólk - og summar av teimum dugdu væl og stýrdu handlunum við harðari hond.

Miðað verður eftir at geva bókina út á heysti 2022.

## #tosa pent við meg

Nógv ungfólk starvast í handilsvinnuni í frítíðini og eftir skúlatíð. Fleiri av teimum sita við kassarnar í ymsu handlunum kring landið, og tað kemur tíverri meira enn so fyri, at hesi ungfólk fáa ymsar óhøviskar viðmerkingar oman yvir seg, sum tey ikki hava uppiborið.

Fyri at verja tey ungu móti slíkum ágangi, hevur Bruna & Arbeiðseftirlitið saman við Handilsvinnufelagnum latið gjørt eitt stutt filmsbrot, ið skal minna okkum á at tosa pent við tey ungu, sum sita við kassarnar í handlunum kring landið. Filmsbrotið verður víst í “Gevið Gætur” innslagnum í Kringvarpi Føroya, beint undan “Degi & Viku”.







*Hetta filmsbrotið í “Gevið Gætur” innslagnum í KVF skal minna okkum á at tosa pent við tey ungu við kassarnar í handlunum kring landið.*

## Handilsvinnan hittir miðnámsskúlanæmingar

Handilsvinnan vitjaði aftur í ár miðnámsskúlanæmingarnar á Glasi og á Kambsdali. Vitjanin á Kambsdali var mikudagin 30. mars, og vitjanin á Glasi var hósdagin 31. mars.

Hesar fyritøkurnar vóru við til vitjanirnar í ár:

- Berglon
- Borg
- Bygma
- Effo
- SMS
- Solar










effo
effo
SHAKE




BYGMA



Endamálið við vitjanunum var at kunna næmingarnar um møguleikan at byrja yrkisleiðina eftir miðnámsskúlan við einum læruplássi í einari føroyskari fyritøku.

Á Glasi var eitt breitt úrval av fyritøkum úr handislvinnuni, framleiðsluvinnuni, smiðju- og byggivinnuni, KT-vinnuni, ferðavinnuni umframt almennum stovnum av ymsum slag. Á Kambsdali vóru bert fyritøkur úr handilsvinnuni umboðaðar.

Á skránni vóru nakrar styttri framløgur, og næmingarnir fingu møguleiki at tosa við luttakandi fyritøkurnar, sum høvdu hvør sín bás við egnum tilfari av ymsum slag til næmingarnar.

Fyritøkurnar høvdu við hesum vitjanum møguleika at heilsa upp á tey ungu, lurta eftir teirra ynskjum og greiða frá, hvat eitt arbeiði í teirra fyritøku fevnir um, og hvørjar møguleikar tey hava, um tey velja eitt lærupláss í akkurát teirra fyritøku.

## Merkantilu útbúgvingarnar

Handilsvinnan er ikki nøgd við føroysku handilsútbúgvingina ella merkantilu útbúgvingarnar sum er. Handilsútbúgvingin er ov lítið praktisk, og fleiri handilslærlingar hava eina fatan av, at teir taka FHS umaftur.

Handilslærlingar mangla tí veruligar avbjóðingar við verkætlanum í síni útbúgving.

Handilsvinnufelagið er umboðað í Yrkisútbúgvingarráðnum, og Yrkisútbúgvinarráðið hevur latið politisku skipanini tilmæli, har mælt verður til at fáa eina betri kobling millum teori og praksis í merkantilu útbúgvingunum.

Tað er neyðugt at gera broytingar í faksamansetiningini og undirvísingarháttinum, sum skal vera meira case grundað.

Broytingarnar kunnu hava við sær, at skúlagongdin fer at fara frá 7 vikum samlað til 9-10 vikur.

Tilmælt verður t.d., at skúlagongdin endar við uppgávu. Ikki sum í dag, har tað kemur fyri, at uppgávan skal skrivast fleiri mánaðir eftir lokna skúlagongd, tí kravt verður, at uppgávan skal skrivast í seinasta partinum av útbúgvingini.

Einki er hent síðan Yrkisútbúgvingarráðið lat politisku skipanin síni tilmæli, men hesa tíðina eru broytingar gjørdar í donsku útbúgvingarskipanini, sum kunnu hava avleiðingar fyri handilslærlingar, ið ætla til Danmarkar at taka skúlan.

Handilsvinnufelagið hevur tí nýliga sent eina áheitan til yrkisútbúgvingarstjóran á Glasi, um at skipa skúlagongdina meira samanhangandi, helst 3 ferðir 2 vikur og í øðrum lagi 1 viku í senn, umframt at skipa undirvísingina meira í verkætlanum og í minni mun sum vanliga skúlagongd. Hetta hevði verið ein stórur fyrimunur, tí tá høvdu tey, sum hava lærlingar vita, hvat undirvíst verður í

hvørt einstakt skeið, og tað gevur møguleikar fyri at taka evnið upp saman við lærlinginum á arbeiðsplássinum.

## Vit sum handla

Handilsvinnufelagið fór í 2019 undir eina tilgongd at branda handilsvinnuna, so hon gerst meira sjónlig í samfelagnum og kemur á radaran hjá teimum ungu, tá ið tey skulu velja yrkisleið.

Hetta varð gjørt við átakinum “Vit sum handla”, hvørs endamál er at gera vart við, at tað eru aðrir møguleikar fyri tey ungu enn bókliga leiðin.

Handilsvinnufelagið valdi beint fyri páskir í fjør at gera eina roynd at taka “Vit sum handla” átakið upp aftur á sosialu miðlunum, við at leggja ymsar postar, sum vendu sær til tey ungu, út á Facebook og Instagram. Hetta átakið koyrdi frá páskum 2021 og árið út.

## Smápakkar úr Kina

Føroysk handilsvinna ynskir javnbjóðis kappingarfortreytir um føroysku kundarnar. Handilsvinnufelagið hevur tí heitt á landsstýrismannin í fíggjarmálum, um at leggja fyri Løgtingið uppskot til neyðugar lógarbroytingar í MVG- og tolllógini, soleiðis at føroysk og útlendsk handilsvinna fáa javnbjóðis kappingarfortreytir at virka undir á føroyska marknaðinum.

Handilsvinnufelagið má tíverri staðfesta, at føroyskir politikarar als ongan áhuga hava fyri at gera nakað við hetta málið.

## Nýggj pantskipan á einnýtisíløt

Á heysti 2021 fór ein arbeiðsbólkur undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum undir eina tilgongd at fyrireika tilmæli til nýggja pantskipan á einnýtisíløt.

Umframt tvey umboð frá Handilsvinnufelagnum, so var arbeiðsbólkurin mannaður við umboðum frá Umhvøvis- og vinnumálaráðnum, Rúsuni, IRF, KOB og Umhvørvisstovuni. Arbeiðsbólkurin fekk eina freist til desember 2021 at vera liðugur við sítt arbeiði, og Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur havt leiðsluna og skrivara uppgávuna í arbeiðsbólkinum.

Úrslitið av arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum er ein frágreiðing, sum varð latin landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Magnus Rasmussen, í februar í ár. Frágreiðingin leggur upp til eina røð av spurningum, sum landsstýrismaðurin má taka støðu til, áðrenn farast kann víðari við at gera tilmæli til lógaruppskot um nýggja pantskipan til einnýtisíløt.

Arbeiðsbólkurin hevur sostatt handað sítt arbeiði, og málið liggur nú hjá landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum.

# Støðan nú og frameftir

Handilsvinnufelagið strembar alla tíðina eftir at fáa fleiri limir í felagið, tí málið hjá Handilsvinnufelagnum er at menna og styrkja føroysku handilsvinnuna, bæði úteftir og millum limirnar í felagnum.

Til at røkka málinum krevst eitt sterkt og sjónligt Handilsvinnufelag við nógvum limum.

Í løtuni eru 62 limir í Handilsvinnufelagnum, og tað er í minna lagi, um felagið skal kunna vísa seg sum eitt sterkt og sjónligt felag at umboða og verja áhugamálini hjá føroyskari handilsvinnu.

Handilsvinnufelagið fer at halda somu kós sum frameftir, har føroyska handilsvinnan alsamt verður gjørd meira sjónlig í almenna rúminum, umframt at skipa fyri tiltøkum av ymsum slag fyri limir felagsins.

Handilsvinnufelagið fer framhaldandi at leggja stóran dent á at veita best møguliga tænastu og ráðgeving til limir sínar.

Einki mál er ov lítið og einki mál er ov stórt at venda sær til Handilsvinnufelagið við.

Um Handilsvinnufelagið ikki setir seg føran fyri at avgreiða ella loysa málið, so vísir felagið til rætta viðkomandi at taka sær av málinum.

Tað verður framvegis ein týdningarmikil uppgáva hjá Handilsvinnufelagnum at umboða limir sínar mótvegis politisku skipanini og almennu myndugleikunum annars, soleiðis at føroysk handilsvinna fær best møguligar karmar at virka innanfyri.

Handilsvinnufelagið heldur tí eitt vakið eyga við lógaruppskotum og galdandi lógum og reglum fyri limir sínar. Endamálið við hesum er at vísa politisku skipanini á, hvørjar lógir og reglur treingja til at verða dagførdar og broyttar, soleiðis at føroysk handilsvinna hevur kappingarførar og smidligar karmar av virka innanfyri.

# Viðtøkur

## Viðtøkur handilsvinnufelagsins

**Kapittul 1**

**Navn, heimstaður og endamál**

**§ 1.** Navn felagsins er Handilsvinnufelagið. Heimstaður felagsins er Tórshavn.

**§ 2.** Endamál felagsins er at savna føroyska handilsvinnu í ein vinnufelgsskap at útinna felags áhugamál.

Í virki sínum skal felagið skipa fyri felags menning í vinnugreinini, bæði í virkjunum, og av teimum karmum virkað verður undir. Millum limirnar skal felagið stuðla undir samskifti og førleikamenning, og úteftir virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu, herundir.

- Menna og ávirka útbúgvingarskipanina fyri handilsvinnuna
- Betra um rekruttering av arbeiðsmegi til vinnugreinina
- Menna handilsvinnuna gjøgnum kunning og skeið
- Greina og vísa á týdningin av handilsvinnuni
- Ávirka og menna karmarnar fyri at reka handilsvinnu
- Hoyring av lóggávu
- Lobbyvirksemi

**Kapittul 2**

**Limaskapur**

**§ 3.** Í felagnum kunnu handilsfyritøkur gerast limir.

Umsókn um limaskap í felagnum verður send umsitingini av felagnum. Nevndin ger ásetingar fyri møguligar treytir fyri limaskapi.

Við innliming í felagið skrivar fyritøkan undir at halda lógir felagsins soleiðis, sum tær eru ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar.

Limur kann siga seg burturúr felagnum við 6 mánað freist.

Limur, sum ikki hevur greitt limagjald kann koyrast út úr felagnum. Henda útkoyring loysir tó ikki viðkomandi lim frá gjaldskyldu síni. Felagið kann krevja limagjald inn umvegis innheinting.

## Kapittul 3

## Limagjald

**§ 4.** Limagjaldið verður ásett á hvørjum ársaðalfundi, fyri eitt ár ísenn. Fult limagjald verður eisini goldið fyri innlimingarárið.

Limagjaldið fellur til gjaldingar tann 1. mai á hvørjum ári. Tó skulu nýggir limir hava rindað limagjald fyri at fáa atkvøðurætt á aðalfundi sama ár sum innliman.

Felagsins inntøkur verða at nýta til rakstur, sum nevndin, ið stendur aðalfundinum til svars, heldur verða neyðugar. Skuldi felagnum verið tørvur á meiri peningi til at fremja ávís mál, hevur aðalfundurin heimild til at útvega neyðuga fígging við tilskotum frá limunum. Eisini kann aðalfundurin til útvegan av slíkum peningi leggja eykagjald á limirnar í hvørjum kalendaraári, tó ikki størri enn tað, ið svarar til tey vanligu limagjøldini.

## Kapittul 4

## Aðalfundurin

**§ 5.** Aðalfundur felagsins hevur hægsta ræðið í øllum viðurskiftum felagsins.

Rætt at koma á aðalfund hava allir limir felagsins.

Ein og hvør, sum hevur rætt til at koma á aðalfund, kann koma fyri annan við sama fundarrætti, um hesin limur hevur fingið fulltrú til tess. Limur kann skrivliga geva øðrum persóni fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna.

**§ 6.** Vanligur aðalfundur verður hildin á hvørjum ári í apríl mánað. Lýst verður til vanliga aðalfundin minst 14 dagar frammanundan. Nevndin ásetir tíð og stað fyri aðalfundin og avger á hvønn hátt hann verður lýstur.

Á aðalfundinum er henda skrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Framløga av limalista
3. Frásøgn nevndarinnar frá farna ári
4. Framløga av grannskoðaðum roknskapi
5. Val av nevnd og tiltakslimum
6. Val av grannskoðara
7. Áseting av limagjaldi
8. Ymiskt

Allar avgerðir verða samtyktar við vanligum meiriluta. Atkvøðubýtið er ásett eftir starvsfólkatalinum hjá limunum soleiðis:

Limirnir hava eina atkvøðu fyri upp til 3 ársverk
millum 4 og 10 ársverk tvær atkvøður
millum 11 og 20 ársverk tríggjar atkvøður
millum 21 og 50 ársverk fýra atkvøður
fyritøkur við fleiri enn 51 ársverkum fimm atkvøður.

Atkvøðugreiðsla á aðalfundinum, ið viðvíkur lógarbroyting, kann bert verða samtykt við ¾ av atkvøðunum. Er fundurin ikki viðtøkuførur, kann verða lýst til nýggjan fund, og ræður tá vanligi meiriluti úrslitinum, uttan mun til fundarluttøku.

**§ 7.** Eykaaðalfundur verður at halda, tá í minsta lagi 2 nevndarlimir, ella minst ¼ av limunum skrivliga krevja tað. Lýst verður til eykaaðalfund á tann hátt og so langa tíð frammanundan, sum nevndin ger av.

## Kapittul 5

## Nevndin

**§ 8.** Felagið verður stjórnað av eini 3 ella 5 manna nevnd. Aðalfundurin velur annaðhvørt ár 1 ella 2 og annaðhvørt ár 2 ella 3 limir í nevnd felagsins, fyri 2 ár ísenn.

1 ella 2 tiltakslimir verða valdir á hvørjum aðalfundi.

Um nevndarlimur tekur seg úr nevndini í úrtíð, tekur fyrst valdi tiltakslimurin við nevndarsessinum.

Miðað verður eftir, at nevndarlimir og tiltakslimir umboða tær ymisku handilsgreinirnar og landið so væl sum tilber.

Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni beint eftir aðalfundin.

Nevndin hevur minst fýra nevndarfundir um árið.

Gerðabók verður førd frá nevndarfundum.

## Kapittul 6

## Tekning/ábyrgd

**§ 9.** Nevndarformaðurin teknar felagið. Nevndin hevur heimild at seta fólk til dagligu leiðslu felagsins, og kann veita slíkum umboðsfulltrú.

Til at upptaka lán, seta í veð, selja ella keypa fasta ogn krevst aðalfundarsamtykt og undirskrift á viðkomandi skjøl av nevndarformanni.

Felagið ábyrgdast bert við teirri til eina og hvørja tíð í felagnum verandi ogn. Í samband við virksemi felagsins, áliggur tað ikki limum og nevnd nøkur fíggjarlig ábyrgd.

## Kapittul 7

## Grannskoðan

**§ 10.** Roknskapur felagsins verður grannskoðaður av einum av aðalfundinum valdum grannskoðara.

Roknskaparárið er kalendaraárið.

Roknskapurin skal liggja til skjals á skrivstovu felagsins, tá lýst er til aðalfund.

## Kapittul 8

## Avtøka av felagnum.

**§ 11.** Felagið kann verða tikið av við ¾ av teimum greiddu atkvøðunum eftir samtykt av tveimum aðalfundum, og mugu í mesta lagi verða lidnir 14 dagar millum fundirnar.

Skuldi felagið verið tikið av, verða ognir felagsins nýttar, soleiðis sum aðalfundurin tekur avgerð um.

Samtyktar á eykaaðalfundi 02. juli 1997.
Broyttar á eykaaðalfundi 06. juni 2001.
Broyttar á eykaaðalfundi 24. august 2011.
Broyttar á eykaaðalfundi 1. mars 2016.
Broyttar á eykaaðalfundi 30. apríl 2019
Broyttar á aðalfundi 17. juni 2020.

# HANDILSVINNUFELAGIÐ

Adressa
Óðinshædd 7
Postboks 1038

Telefonnummar
309900

Teldupostur
mortan@industry.fo

Fartelefon
739907

Heimasíða
www.industry.fo

